



*Tey hava tað gott saman teir fimm næmingarnir og lærari teirra – vinstrumegin: Martin í 2. flokki, Laila í 4. flokki, Ári í 5. flokki, Eyðun í 4. flokki og Hans í 3. flokki. Aftanfyri sæst lærari teirra, Jens Pauli í Dali*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Eitt lív eftir skúlan

Skúlin er kortini ikki alt í teirra lívi. Aftaná skúlatíð taka børnini við ymisk spøl – serliga uttandura, Eyðuni dámar væl at sparka, og fær hann ofta vitjan av Ára. Tá kunnu teir finna uppá ymisk spøl úti og frammanfyri telduna. - Vit eru eisini onkutíð niðri á sandinum. Tá veðrið er gott, eru sera nógv fólk her, siga næmingarnir. Laila dámar væl at gera fimleik, og gongur hon til fimleik og flogbólt í Kollafirði. Hon er rættiliga nógv í Kollafirði, har hon hevur familju. Og tey úr Kollafirði koma hinvegin ofta til Leynar at vitja hana. Næmingarnir ganga í Leyna skúla til og við 5. flokk, tá tey síðani fara í Kvívíkar skúla. Sum støðan er nú, eru fleiri børn í bygdini undir skúlaaldur. So líkt er til at skúlagongdin verður í skúlanum eisini í framtíðini.

# Brot úr skúlasøguni í Leynum

Fyri júst 100 árum síðani - í 1907 - vórðu Kvívíks og Leyna skúli bygdir. Stutt frammanundan var Karin Samuelsen úr Kvívík sett sum einalærari fyri Leynar, Vál og Kvívík. Áðrenn høvdu privatmenn í Leynum og Stykkinum havt royndir við at hava skúlagongd til teirra egnu børn. Karin var lærari í øllum bygdunum til 1919.

Nú lærari var settur, skuldi hann ferðast millum allar tríggjar bygdirnar. Skúladagarnir vórðu býttir nøkulunda eftir barnatalinum: Einar 4-5 dagar á Válinum, 7-8 í Leynum og nakrar fleiri í Kvívík.

Á Válinum varð skúli hildin í privathúsi til 1951, tá skúli og læraraíbúð vórðu bygd har. Um somu tíð vórðu lærarahús gjørd til lærararnar í Kvívík og Leynum. Ofta var torført at ferðast ímillum bygdirnar fyri kava og illveðri, helst út á Vál. Eftir Karin komu Kristian Bjarnadal og Johanna Jensen at vera lærarar.

### 31 skúlabørn á Leynum

1. januar í 1927 verður Christian Høj settur einalærari fyri skúlarnar í Leynum og Válinum, og Johanna Jensen verður burturav lærarinna í Kvívík. Dagatalið verður býtt nøkulunda eftir barnatalinum í báðum bygdunum – 1/3 á Válinum og 2/3 í Leynum. Seinni, í 1953 játta myndugleikarnir í Havn at gangast skal í skúla líka nógvar dagar í báðum bygdunum, eina viku ella tvær vikur í hvørjari ísenn. Christian høj var einalærari frá 1927 til 33, tá hann fór inn á Strendur.

Í Leynum gingu børn úr Leynum og Stykkinum. Hægsta barnatal ein veit um í Leyna skúla er í 1920, tá 31 børn ganga í skúlanum. Mesta talið á Válinum er í 1932, tá 16 børn ganga har.

Børnini á Stykkinum ganga í Leyna skúla líka til umleið 1970, tá ongi skúlabørn eru har í fleiri ár. Seinni, seinast í 70'unum ella fyrst í 80'unum, tá skúlabørn aftur eru har, fara tey í Kvívíkar skúla, tí tá var skúlabussur komin at koyra millum bygdirnar í kommununi og eisini til Vestmanna í eldru flokkarnar. Umframt hetta fingu tey skúlagongd hvønn dag í Kvívík, meðan í Leynum gingu tey hálva tíð.

Í 1967 verður avgjørt bara at hava 1. til 5. árgang í báðum skúlunum; 6. til 7. skúlaár gingu tey í Vestmanna. Seinni, í 80'unum fóru Leynabørn til Kvívíkar í 6. til 7. árgang og síðani í framhaldsdeild í Vestmanna.

### Einalærarar

Aftaná 1967, tá bert fimm árgangir vóru, hevur barnatalið í Leynum verið umleið 5-8, og upp í 10-11 børn, og á Válinum uml. 4-6 børn til umleið 10 børn.

Í skúlaárinum 1988-89 er einki skúlabarn á Válinum. Tá fara børnini í Leynum at ganga hvønn dag í skúla. Í 89-92 eru 3 børn á Válinum, og verður tá gingið fyrrapart í Leynum og seinnapart á Válinum. Aftaná 1992 fara børnini á Válinum at ganga í Vestmanna skúla burturav.

Aftaná Christian Høj komu fleiri lærarar í einalærarastarvið í Leyna-Vála skúla. Teir sum vóru longst vóru:
1933-49 Elin Sofía Jacobsen, Kvívík
1950-65 Maria Hansen, Leynar
1967-72 og 1977 og frameftir Jens Pauli í Dali
1965-67 og 1972-1977: Nakrir ársvikarar við realella studentsprógvi. Onkur í longri tíð.

At flestu bygdafólkini vilja varðveita skúla er tí tey vilja hava at yngru børnini ikki verða noydd at fara av bygdini fyrstu skúlaárini. Seinastu fýra árini hava verið tveir lærarar við skúlan – Jens Pauli í Dali og ein, ið tók avloysaratímar.

(Kelda: Jens Pauli í Dali, lærari)

## Øll árini í Kvívík

Tað eru tó fleiri skúlabørn í Leynum enn hesi fimm, sum ganga í bygdarskúlanum. Í Kvívíkar skúla ganga í løtuni seks næmingar úr Leynum í 1., 3. og 5. flokki. Orsøkin til hetta er ymisk. Heldur enn at koyra tey í dagstovn í Kvívík, fyri síðani at ganga tey fyrstu fimm árini í Leyna skúla og eftir tað halda fram í Kvívíkar skúla, velja fleiri at lata barnið bæði ganga í barnagarð og barnaskúla í Kvívík. Víst verður á, at hesir báðir stovnarnir liggja í roynd og veru í sama umhvørvi. Haraftrat verður víst á, at í Kvívík er eitt størri skúlaumhvørvi og ein nýggjari skúli við størri útboði og útbúnaði til undirvísingina.

